# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Sendistovan í gamla snikkaravirkinum




*Nýggju hølini hjá Sendistovuni. Høgrumegin er annar av stjórunum, Christian Nagata*

*Myndir: Sendistovan og Jens Kristian Vang*

Tað sum í mong ár var Snikkaravirkið í Grønlandi er í dag karmur um størstu lýsingarfyritøku í landinum. Talan er um lýsingarfyritøkuna Sendistovan, sum er ein samanrenning av lýsingarstovunum Team85 og ReproZ, sum fyri stuttum gjørdust partur av Nema-samtakinum.

Hósdagin 6. desember var móttøka í nýumvældu hølunum, har viðskiftafólk og onnur áhugað høvdu høvi at síggja hølini, samstundis sum nýggja navnið varð avdúkað.

Sendistovan er ein heildarfyritøku við førleikum innan marknaðarráðgeving, sniðgeving, samskifti, marknaðarføring, heimasíður v.m.

Stjórar í nýggju fyritøkuni eru Christian Nagata og Poul Clementsen.

mg




*Poul Clementsen, stjóri, heldur talu*







*Móttøka var í nýumvældu hølunum hjá Sendistovuni, har viðskiftafólk og onnur áhugað høvdu høvi at síggja hølini, samstundis sum nýggja navnið varð avdúkað*

